

## Vejle vann umsíðir

Í 13. umfari av superliguni í gjár vann Vejle sín fyrsta dyst í ár. Vejle hevur havt tað sera trupult sum uppflytari til superliguni, og liðið hevur bert fingið onkran javnleik higartil. Men í gjár bragdaði umsíðir hjá Vejle, sum vann 3-2 á FC Nordsjælland á heimavølli. Issey Nakajima skoraði tvey av málunum, og fyrrverandi NSÍ-álopsspælarin Ulrik Balling gjørdi eitt av málunum. Vejle liggur tó framvegis aftast í superliguni.

## United knógvaði Liverpool

Arvafíggindarnir í Onglandi Manchester United og Liverpool brustu saman á Old Trafford seinnapartin í gjár. Í einum ferðmiklum dysti endaði Manchester United omaná. Úrslitið gjørdist 2-0 til heimaliðið, og sigurin var uppiborin.

Stutt fyri hálvleik legði miðvallarin Paul Scholes heimaliðið á odda og miðskeiðis í seinna hálvleiki økti enski landsliðsleikarin Rio Ferdinand til 2-0. Úrslitið hevur við sær, Liverpool má metast at vera úti av stríðnum um meistaraheitið eftir laka byrjan upp á kappingarárið. Betur stendur til hjá Manchester United, sum liggur á odda í Premier League við sama stigatalið sum meistararnir úr Chelsea.

# Høvuðsstaðurin eigur patent upp á

**Vónbrotið á Mølini var ræðuligt, tá ið FM gullið fyri sættu ferð á rað endaði í Havnini eftir kapping, sum enn eina ferð vísti seg at verða framúr spennandi**



*HB er mest vinnandi felagið í landinum, og ikki minst í ár hevur HB víst ótrúligan vinnarahugburð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FORMULA DEILDIN
27. UMFAR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fjarstøðan millum Eiði og Havnina hevur ongantíð kenst so stór sum leygardagin. Í hvussu so er tá ið tað ræður um kensluliga spennið. Í hvassa landnyrðingsvindinum á Mølini eftir døgurða kendist gullrákin ramur. Í Gundadali vóru silvurkrónurnar, og hóast uppgávan móti ÍF tóktist yvirkomilig, so var tað lítið, sum bendi á, at tað skuldi verða til annað enn silvur hjá HB.

Klokkan knappliga fimm var alt vent á høvdið. Gullkrónurnar og FM steypið fóru við ferð undan vindinum suður gjøgnum Sundalagið, yvir um brúnna og í Gundadal. Á vegnum møtti fínasta skreytið silvurkrónunum, sum í stríðum mótvindi vóru á veg norður til Eiðis.

Gundadalur kókaði, og á Mølini vóru tey sum sligin á nevið í regninum og kuldanum. Tað var einki at siga til, at lagið í Gundadali, sum hevði verið hampuligt, fór heilt í topp, og tað var ikki minni væl skiljandi, at hýrurin millum tey á felagsliðnum fór fullkomuliga í kjallaran, hóast EB/Streymur við næstfremsta plássinum megnaði betri úrslit, enn felagið nakrantíð áður hevur megnað.

Í politikki verður ofta tikið til, at tað er betri at vinna eitt val enn at standa seg best í hundrað veljarakanningum. Í HB og EB/Streymi duga tey betri enn nakar annar at skilja sannleikan í hesum.

**Gummibeinini snávaðu**

Fyrsta umfar var á skránni 2. apríl. EB/Streymur vann á heimavølli 2-1 ímóti B68. HB vann 5-1 á heimavølli móti ÍF. Í fyrstu støðutalvuni var HB oddalið. Eftir 3-0 sigur á VB/Sumba var GÍ á øðrum plássi, og EB/Streymur var á triðja plássi. Í øðrum umfari vann EB/Streymur 3-2 í Gundadali ímóti HB. GÍ spældi 1-1 á Toftum. B36, sum í fyrsta umfari hevði vunnið 1-0 á Skála, vann 3-1 í Fuglafirði, og KÍ, sum í fyrsta umfari hevði vunnið 1-0 í Runavík, spældi 2-2 á heimavølli ímóti Skála.

B36 var ovast eftir tvey umfør. Í triðja umfari vann EB/Streymur 2-0 á ÍF. B36 spældi á heimavølli 1-1 ímóti KÍ, og GÍ vann 3-2 á HB. Einasta felagið, sum hevði fult stigatal, var EB/Streymur. Felagsliðið var ovast á støðutalvuni, og soleiðis, sum umfar datt av umfari, staðfesti EB/Streymur oddasessin meiri og meiri.

Fyri einum mánað síðani var EB/Streymur sjey stig undan HB, sum eftir knúsandi 5-1 heimasigur á KÍ var einasta liðið, ið hevði evarska lítlan møguleika at fáa fatur á oddaliðnum. B36 spilti sín møguleika, tá ið teir taptu 2-1 í Fuglafirði.

Í sluttspurtinum fingu teir á Eiði gummibein, sum tað plagar at verða tikið til. Meðan HB fekk tólv stig ímóti B36, VB/Sumba, B68 og ÍF, fekk EB/Streymur fýra stig ímóti B68, GÍ, ÍF og KÍ.

Eitt stig í síðsta umfarinum hevði verið nóg mikið hjá EB/Streymi. Tað eydnaðist ikki at fáa nakað stig. KÍ vann 1-0 á Eiði, og harvið vóru klaksvíkingar við til so at siga at spæla FM heitið upp í hendurnar á arvafíggindanum. KÍ avrikið og úrslitið undirstrikar, at tað á ongan hátt luktar av italskari støðu í føroyskum fótbólti.

EB/Streymur hevur ongantíð áður verið í nánd av at vera so tætt gullinum, sum teir vóru tað hesa ferð. Í síðstu umførunum mundu teir á samansetta liðnum stríðast mest við seg sjálvar. Tað stríðið taptu teir. At teir ikki megnaðu meiri enn 1-1 á Toftum, og at teir taptu 3-2 á heimavølli ímóti GÍ vísti seg at kosta gullið og tað lítlu milliónina, sum er á muni í upphæddunum, sum UEFA leskar gullið og silvurið við!

**Ótrúligur hugburður**

Gullið endaði aftur í ár í høvuðsstaðnum. Hetta var sætta árið á rað, at feløgini, sum halda til í Gundadali, vóru best. B36 var meistari í 2001, HB vann í 2002, 2003 og í 2004, B36 var meistari í fjør, og nú var HB aftur best.

KÍ var meistari í 1999 og VB í 2000. Síðani hevur gullið hoyrt til í Havnini. KÍ eigur framvegis metið við fimm FM heitum á rað. Men nú kunnu havnarmenn vísa á, at tað ongantíð áður er komið fyri, at eitt og sama pláss í landinum hevur vunnið FM seks ferðir á rað. Og klaksvíkingar kunnu svara aftur við at vísa á, at tað vóru teir við til at syrgja fyri!

HB er mest vinnandi felagið í landinum, og ikki minst í ár hevur HB víst ótrúligan vinnarahugburð. Fyri góðari viku síðani stóðu teir í EB/Streymi í Fuglafirði og bíðaðu fyri at vita, um teir longu tá høvdu vunnið FM. HB skoraði sigursmálið á Svangaskarði í síðstu løtu. Leygardagin sá leingi einki út hjá HB, men síðstu løtuna skoraðu teir tvey mál ímóti ÍF. Soleiðis hevur uppskriftin so ofta verið fyrr í ár. Tap og javnleikir hevur HB í evstu løtu megnað at vent til javnleikir og sigrar.

EB/Streymur hevur skorað tvey mál fleiri enn HB, og seks mál færri eru farin ígjøgnum hjá EB/Streymi, enn tað eru farin ígjøgnum hjá HB. Bæði tey fremstu liðini hava vunnið 16 dystir, men HB fór eina ferð færri av vøllinum sum tapari, enn EB/Streymur fór tað. Tí er HB meistari. Hjartaliga tillukku við tí!

**Koppar suðureftir**

Klaksvíkingar eru neyvan nøgdir við fjórða plássið. Venjarin segði í vár, at teir heilt víst fóru at vinna okkurt. Sammett við í fjør kunnu gøtumenn liva við sætta plássinum, meðan teir í NSÍ, sum søgdu seg miðja eftir gullinum, sjálvandi ikki kunnu vera nøgdir við fimta plássið. Á Skála vunnu teir í fjør silvur. Tað er langt lop frá næstfremsta plássinum og